## DAGSINS MEINING

### Pensiónsspurningurin

Jógvan Sundstein, fyrrverandi, løgmaður tók í vikuskiftisblaðnum tráðin upp frá sjónvarpskjaki fyrr í vikuni um pensiónsspurningin. Bakgrundin er tann, at arbeiðið við eini nýggjari pensiónsskipan er steðgað upp. Hetta, at arbeiðið er stegðað upp, er mikið spell. Pensiónsmálið var eitt høvuðsmálið undir samgongusamráðingunm, tá sitandi samgonga varð skipað. Hetta var eitt av aðalmálunum hjá Javnaðarflokkinum og ein tungtvigandi orsøk til at fara upp í júst hesa samgonguna. Tað má tí koma flokkinum sera illa við, at nevndin, sum skuldi koma við uppskoti til eina nýggja skipan ikki hevur verið virkin tað seinasta árið. Hetta er sera óheppið, og kann hetta koma at merkja, at eingin nýggj pensiónsskipan kemur í gildi í hesum valskeiðinum. Hetta fer ikki bert at verða sera óheppið politiskt fyri teir trýggjar samgonguflokkarnar. Hetta er eisini sera óheppið fyri verandi og komandi pensionistar.

Tað kann ikki bera til, at tað skal taka fleiri ár at koma við uppskoti til eina nýggja pensiónsskipan. Samgongan var jú samd um, at vit skulu hava eina skipan, sum stendur á trimum beinum: fólkapensión, samhaldsfesti og skipan t.d. gjøgnum eitt fakfelag og arbeiðsgevarafelag, sum so gera avtalu við LÍV ella peningastovn. Sum Sundstein vísir á, so hava vit longu í verandi skipan støði undir eini góðari framtíðarskipan. Tað er at lata fólkapensiónina framvegis verða skattafría, at økja gjaldið hjá tí einstaka løntakaranum og arbeiðsgevaranum til samhaldsfasta og so eggja løntakarunum til at gera egnar skipanir. Tað tykist sum tað møguliga er hetta triðja beinið, sum pínir. Um tað veruliga er so, at løntakararnir ikki megna at gera sjálvbodnar skipanir við avtalum, so má umhugsast at lóggeva fyri hesum. Tað var tað, sum hendi í Íslandi og merkir hetta, at tey, sum nú eru í góðum árum á arbeiðsmarknaðinum um 15-20 ár fara frá við eini av heimsins bestu pensiónsskipanum, alt meðan okkara løntakarar halta aftaná.

Tað hastar veruliga við at fáa til vega eina nýggja føroyska pensiónsskipan. Henda kann, sum Sundstein vísir á, verða ein skipan, sum byggir uppá eitt samanspæl av uppsparing av almennum pengi, egnum inngjaldingum og arbeiðsgevarainngjaldingum. Í hesum høpi er tað, sum Sundstein eisini vísir á, neyðugt at ávísir tryggleikar og reglur eiga at verða skapt m.a. tí nøkur kunnu vera í vanda fyri at fella uttanfyri eina skipan við trimum beinum. Hetta er ábyrgdin hjá politiska myndugleikanum at síggja til, at framtíðar skipanin verður rættvís. Jú víst hastar tað, tí uttan mun til, hvat hetta endar við, so fara tað at ganga mong ár, áðrenn borgararnir fáa gleði av eini nýggjari skipan. Farast má undir arbeiðið av álvara her og nú.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Óbrúkta ytringsfrælsið

JOHAN PETERSEN

**– Í hesum døgum stendur Danmark einsamalt á odda at verja grundleggjandi vesturlendsku demokratisku rættindini mótvegis fanatiskum religiøsum islamistum. Men hvussu er statt í Føroyum við hesum sama ytringsfrælsi? Verður tað í heila tikið brúkt, sum tað er ætlað? Annað enn at skriva fyri ella ímóti samkyndum?**

Ytringsfrælsið – ella skriviog talufrælsið, sum tað mangulfult verður nevnt á føroyskum – er ein av grundarsteinunum undir vesturlendsku demokratisku skipanini. Hetta frælsið sleppur nú at standa sína roynd mótvegis fanatiskum religiøsum islamistiskum massamótmælum. Higatil hevur Danmark staðið einsamælt á odda at verja hesi rættindi, tó í seinastuni varisliga stuðlað av norskum og fronskum fjølmiðlum og EU politikarum.

**Einoygdur tíðindaflutningur**

Men hvussu verður hetta frælsið nýtt í Føroyum, har fjølmiðlar og journalistar skuldu gingið á odda at gjørt brúk av hesum rættindum? At tíðindabløð sum Sosialurin og Dimmalætting velja at føra ein einoygdan tíðindaflutning, er teirra val og teirra rættur at velja, við tað at tey eru privatir fjølmiðlar, men spell er, at t.d. serliga Dimmalætting í síni roynd at leggja frástøðu millum seg og Sambandsflokkin, sum hon í eina øld hevur stuðlað, fer so langt yvir í fullveldisgrøvina, at hon als ikki kann sigast at flyta fram óheftan tíðindaflutning.

Men allarverst er, at almennu fjølmiðalarnir – Útvarp Føroya og Sjónvrap Føroya ella Kringvarpið, sum tað nú eitur – sum sambært lóg eru pliktað at føra óheftan tíðindflutning, als ikki livir upp til hesa áseting.

**Útvarpið sekritariat fyri Tjóðveldisflokkin?**

Kringvarpið er so heft at fullveldishugsjónini og Tjóðveldisflokkinum, at tað er hesum miðli fyri at takka, at smámál, sum Tjóðveldisflokkurin roynir at føra seg fram við, og sum aðrastaðni neyvan høvdu verið tikin upp á tungu, verða blást upp til at verða stórmál, sum seta dagskránna. Tak eitt nú mál sum hvør, ið hevði skrivað taluna hjá Margrethu drottning og fráboðanina hjá donsku stjórnini til ST. Í málinum um drotningataluna fór útvarpið so langt, sum at biðja um innlit áðrenn Tjóðveldisflokkurin gjørdi tað. Útvarpið var við øðrum orðum eitt sekritariat fyri Tjóðveldisflokkin?

Tak eitt mál sum uppblásta íslendska íløguvirksemið, sum vit vita alt um frá Kringvarpinum, men sunna danska búskapin, sum er ein av heimsins sterkastu, hoyra vit onki um. Donsk tíðindi eru sera sjáldsom og serliga positiv tíðindi, men nagtivu fáa vit av og á.

Ja, Kringvarpið loyvir sær enntá at hava aktivar tjóðveldispolitikarar sum leiðarar.

**Fjølmiðlaábyrgdarlógin manglar enn**

Tað, ið ger tað møguligt hjá Kringvarpinum framhaldandi at lívga um tjóðveldishugsjónina er manglandi fjølmiðlaábyrgdarlógin. Hesa lóg stóðgaði Tjóðveldisflokkurin, tá ið hann kom framat í 1998. Hóast løgtingsins umboðsmaður fleiri ferðir hevur átalað manglandi lóggávuna, hendi onki. Hví?

Síðan nýggja samgongan kom í Tinganes, hevur verið sagt alment – seinast frá Jógvani við Keldu – at lógaruppskotið skuldi leggjast fram á ólavsøku 2005, men enn er onki uppskot komið á tingborð!

Nær ætlar nýggi landsstýrismaðurin í lógarmálum, Jacob Vestergaard, at lggja uppskotið fram?

**Hví bora føroyskir journalistar ikki?**

Hví bora føroyskir journalistar ikki í veruligum málum, sum t.d. hvussu kundi føroyska samfelagið verið, um blokkniðurskurðurin – sum higartil hevur kostað føroyingum beinleiðis 1,5 mia. kr. og við multiplikatiónsfaktorinum nærri 4 mia. kr. – ikki var framdur og hvussu kundi føroyska sjúkrahúsverkið verið, um tað hevði fingið somu upphædd í blokkinum, sum tað fekk í gomlu refusiónsskipanini – hetta kostaði sjúkrahúsverkinum 1, 0 mia. kr. í tíðarskeiðinum 1988-98, so nú man tátta væl í 2 mia. kr. Hví fylgir eingir føroyskur journalistur upp upp á mál, sum t.d. tá Jóhan Dahl noyddist at leggja frá sær sum landsstýrismaður í fiskivinnumálum, men sum tað síðan vísti ikki at verða nøkur haldgóð grundgeving fyri?

Eru føroyskir journalistar veruliga so undirbráttligir, at teir ikki tora at brúka ytringsfrælsið? Jú, ein er tó, sum í fult mát brúkar tað og tað er Óli P. Tøkk fái hann fyri tað!

# Postkassar og vard verkstøð



HØGNI HOYDAL
Løgtingsmaður

Við nýggju krøvunum í sambandi við postútbering, skulu helst heilt nógv húsarhald flyta postkassar og keypa sær nýggjan ella annað slag av postkassa.

Tí havi eg hesa áheitan á vardu verkstøðini í landinum, Postverkið og onnur, ið hava møguleikan at taka avgerð um tílíkt:

Kunnu tey vardu verkstøðini í landinum, sum framleiða so nógv annað skilagott, ikki framleiða postkassar, ið lúka nýggju krøvini?

Tað hevði verið møguleiki at gjørt eina dygdarvøru, ið lýkur krøvini til føroyska veðurlagið. Tað hevði verið kærkomin inntøka til verkstøðini. Og tað hevði verið føroysk framleiðsla til gagns fyri samfelagsbúskapin.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:**
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.